## Flokkarnir kannast

Í Íslandi hevur ríkisgrannskoðanin fingið boð um at kanna fíggjarligu viðurskiftini hjá teimum politisku flokkunum í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2006, tá ein nýggj lóg um fíggjarviðurskifti flokkanna kom í gildi. Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri, setti fyrradagin eina nevnd at endurskoða tey fíggjarligu viðurskiftini hjá flokkunum, og nevndin skal arbeiða saman við ríkisgrannskoðanini. Nevndin skal kanna øll tey fíggjarligu viðurskiftini, sum eru tengd at teimum einstøku flokkunum, og tí umfatar kanningin valfeløg og í summum førum einstøk valevni umframt flokkarnar sjálvar.



## Aftur uppsagnir hjá Danfoss

Tað gongur sera illa hjá donsku ídnaðarfyritøkuni Danfoss. Í gjár kunngjørdi fyritøkan, at hon hevði 562 milliónir krónur í halli tríggjar teir fyrstu mánaðirnar av árinum, og beint aftaná bleiv fráboðað, at fyritøkan noyddist at siga umleið 250 fólkum úr starvi. Millum 180 og 190 av teimum, sum verða uppsøgd, arbeiða á Danfoss-deildini í Gråsten í Suðurjyllandi, og uppsagnirnar raka lokalsamfelagið sera meint. Útlitini fyri at fáa annað arbeiði eru heldur ikki tey bestu, og tað er heldur einki, sum bendir á, at Danfoss fer at seta fólk aftur í bræði, skrivar JydskeVestkysten.

# Foreldrini fingu sín vija

**Foreldur at børnum í frítíðarskúlanum Sornhúsinum í Klaksvík fegnast um, at frítíðarskúlin hóast alt ikki verður fluttur. Høvdu vit ikki gjørt vart við okkum, so hevði frítíðarskúlin verið fluttur, heldur umboð fyri foreldrini**

FRÍTÍÐARSKÚLI

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað hjálpti at gera vart við seg. Foreldur at børnum, sum ganga í frítíðarskúlanum Sornhúsinum í Klaksvík, mótmæltu í farnu viku, at frítíðarskúlin skuldi flytast, og í gjár avgjørdi meirilutin í Klaksvíkar býráð at strika flytingina av frítíðarskúlanum.

Klaksvíkar kommuna hevði annars tikið avgerð um at flyta frítíðarskúlan úr leigaðum hølum í Bøgøtu og í Virkishúsið á Klaksvíksvegi, sum kommunan sjálv eigur. Hetta vóru foreldur misnøgd við, tí frítíðarskúlin hevði verið fluttur burtur frá fótbóltsvølli, svimjihøll, skúla og ítróttarhøll. Í farnu viku mótmæltu foreldur avgerðini, og nú hevur Klaksvíkar kommuna broytt hugsan, og frítíðarskúlin verður verðandi í Bøgøtu.

### Loysti seg at mótmæla

Meirilutin í Klaksvikar býráði sigur í einari fráboðan, at orsøkin til broyttu avgerðina er, at stýrið fyri sjálvsognarstovnin, ið rekur frítíðarskulan, hevur funnið aðrar sparingar, sum svara til tað, sum kommunan vildi spara við at flyta frítíðarskúlan. Stýrið hevur funnið sparingar í húsaleigu, matarskipan og starvsfólkakostnaði.

Tí hevur meirilutin í Klaksvíkar býráðið gjørt av, at frítíðarskúlin ikki skal flytast, men meirilutin fegnast samstundis um, at sparingar eru funnar á frítíðarskúlanum.

Súsanna Lydersen, sum umboðar foreldrini í frítíðarskúlanum Sodnhúsið, fegnast um, at Klaksvíkar kommuna hevur broytt hugsan um at flyta frítíðarskúlan.

- Vit vilja takk øllum, sum hava virkað fyri, at frítíðarskúlin kann halda fram í verðandi hølum, tí tað er besta loysnin, sigur Súsanna Lydersen.

- Vit halda, at tað hjálpti at gera vart við okkum, tí um vit ikki høvdu gjørt tað, so hevði avgerðin um at flyta frítíðarskúlan neyvan verið broytt, sigur hon.



*Foreldrini fingu gjørt vart við seg, og frítíðarskúlin varð ikki fluttur*

# Umvæla tornið á Havnar kirkju

**Menn frá Articon eru farnir í holt við at umvæla tornið á Havnar kirkju. Tá hetta arbeiðið er liðugt, er øll kirkjan sum hon er umvæld**

UMVÆLING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Havnar kirkja hevur gjøgnum fleiri ár staðið fyri einari mivísari umvæling, har partar av kirkjuni eru umvældir so við og við. Nú er tørnið komið til tornið, og tá tað er liðugt umvælt, er komið runt.

Stiladsið er sett upp, og sjálv umvælingin fer nú í gongd.

Tá arbeitt verður við gomlum friðaðum bygningum sum kirkjan er, so skal alt gerast í samráð við Fornminnissavnið, sigur Jákup Símun Simonsen, formaður í kirkjuráðnum í Havn.

Umframt sjálvt tornið skulu eisini urskivurnar frískast upp eina og sjálvur spírurin skal shinast upp.

Kirkjan er upprunaliga bygd í 1788, men fekk eina gjølliga og umfatandi umvæling og umbygging í 1865, og gjørdist tá sum nýggj.

Tað er Articon, sum stendur fyri arbeiðinum, sum væntandi fer at vara einar tveir mánaðir, sigur Jákup Símun Simonsen.

Tað er Jórun í Dali, arkitektur, sum hevur eftirlit við arbeiðinum.



*Stiladsið er sett upp og sjálv umvælingin av torninum er farin í gongd*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hjálpir fólki at flyta pengar

**62°N kann nú saman við vanligu ferðurnum, tey bjóða, bilaleigu, hotelgisting, kiosk- og cafeteravirksemi nú eisini bjóða kundum sínum hjálp at flyta pengar uttanlands**

FERÐING

*Tíðindaskriv*

- Føroyar eru vorðnar ein partur av globaliseraða heiminum. Fólk flyta higar at búgva, arbeiða ella lesa, og tað skapar ein tørv fyri at tryggja sambond við familju og vinir í heimlandinum. Eisini tá tað snýr seg um pengar, sigur Kent L. Christensen frá 62°N.

Hann fegnast um samstarvið við Wester Union. Eitt samstarv, sum eitt nú merkir, at 62°N kann bjóða eina týdningarmikla tænastu til eitt nú fremmandafólk, sum búgva í Føroyum og hava tørv á at senda pengar heim til familjuna.

- Talan er um eina sera einfalda skipan, sigur Kent Christensen. Við at fylla út eitt skjal, gjalda ta upphædd, sum tú vilt senda – og stutt eftir eru pengarnir klárir til útgjaldan í tí landinum, higar tú sendi teir, greiðir Kent L. Christensen frá 62°N.

Hann leggur dent á, at tænasta einsini kann nýtast av føroyingum, sum lesa uttanlands ella eru í feriu utanlands og bráðliga hava brúk fyri pengum. Við Western Unionskipanini kunnu tey nú fáa familjuna heima at senda pengarnar, har tey eru í feriu.

Western Union er eitt av heimsins fremstu feløgum innan peningaavgreiðslu. Felagið er í dag umboðað í fleiri enn 200 londum og hjá fleiri enn 325.000 umboðum.